# Vegleiðing til innlating av uppgerð - kappingar uttanlands 2026

**INNLATINGARFREIST:** 2 mðr aftaná tiltakið.

Til innlating av uppgerðini, skal skjalið ”*Skjal_til_uppgerð_Altjóða_kappingar.xlxs*” fyllast út, (tit fáa eitt nýtt á hvørjum ári - brúkið tað!) og nøktandi próvskjøl (*t.d. fakturi/kvittan*) skulu talmerkjast samsvarandi.
**Hugsið altíð, at tað skal vera lætt hjá okkum sum móttakari at fylgja við - skjótt og greitt.**

**Stuðulin verður roknaður út frá Samlaða kostnaðinum, sum er = Útreiðslur minus Inntøkur**

Ber ikki til at greiða nóg væl frá eini útreiðslu, leggja tit eitt eyka skjal við (eisini talmerkt) har nærri verður greitt frá.

***Er ikki rætt og/ella nóg greitt fylt út, verða tit biðin um at senda inn av nýggjum.***

Eisini er **sera umráðandi**, at tit lata inn frágreiðing (heilt stutt) frá tiltakinum, serliga í mun til umsóknina:

- Varð virksemið samsvarandi umsóknini?
- Hvussu gekk hetta?
- Var virksemið ikki samsvarandi umsóknini - og í so fall, hví ikki?
- Greiðið frá, hvussu hevur gingist hjá íðkaranum/liðnum, og hvat viðkomandi t.d. hevur fingið burturúr. Skrivið gjarna meira enn tað, um tað er viðkomandi.

Tit, sum ivast, eru altíð vælkomin at ringja til skrivstovuna hjá ÍSF tel.nr. 312606 ella skriva til isf@isf.fo - vit vegleiða fegin.

## VEGLEIÐING:

**Gjald fyri mat, tá íðkarin/íðkararnir er uttanlands til kapping:**

**Allarbest er at tit senda inn felags faktura fyri mat.** Men hava tit fleiri enn uml. tríggjar fakturar/kvittanir til mat og drekka, eiga tit at senda uppgerð yvir dagviðbøtur heldur:

- Tá matur ikki er íroknaður uppihaldinum, er dagviðbótin kr. 360 pr. dag
- Er matur íroknaður, er upphæddin 40% av dagviðbótini = kr. 144 pr. dag
- **Tað skal verða greitt á próvskjalinum** fyri uppihaldinum, hvørt matur er íroknaður ella ikki

***DØMI: Tiltakið er 19.-24. mars, har matur er íroknaður uppihaldinum:***
kr. 144 pr. dag 19.-24. mars (6x144) = kr. 864 pr. persón

***DØMI: Tiltakið er 19.-24. mars, har matur IKKI er íroknaður uppihaldinum (tó morgunmatur):***
kr. 360 pr. dag 19.-24. mars (6x360) = kr. 2.160 pr. persón

**Ferðing:** roknað verður við, at íðkarin ella Sambandið roynir at velja bíligasta ferðamátan. Er ein upphædd óvanliga høg, t.d. flogferðaseðilin, ella verður taxa ofta brúkt heldur enn tok ella buss t.d., eiga tit at greiða frá hesum. Ferðin uttanlands byrjar og endar á flogvøllinum. Ella á kaikantinum, um farið verður við Norrønu.